# Fíggjarmálaráðið

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 22.01.2025 |
| Mál nr.: | 25/02135 |
| Málsviðgjørt: | BAB, TM |
| Ummælistíð: | 27.01.2025 til 14.02.2025 |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

**Uppskot til**

## Kunngerð
## um
## loyvi til flutningsfeløg og speditørar

Við heimild í § 10a, § 13, stk. 3 og § 36, stk. 2 í løgtingslóg nr. 121 frá 23. desember 1991 um toll, sum broytt við løgtingslóg nr. 109 frá 13. juni 1997 um broyting í løgtingslóg um toll, løgtingslóg nr. 35 frá 26. mars 2002 um broyting í løgtingslóg um toll, løgtingslóg nr. 118 frá 1. desember 2003 um broyting í løgtingslóg um toll, og løgtingslóg nr. 49 frá 4. mai 2021 um broyting í løgtingslóg um toll verður ásett:

**§ 1.** TAKS kann eftir umsókn geva flutningsfyritøkum og speditørum loyvi til at tollavgreiða, gjalda og útflýggja vøru til ávísar kundar.
*Stk. 2.* Loyvið er treytað av, at tollavgreiðsla og inngjalding fer fram elektroniskt, og at trygd frammanundan er veitt fyri tolli og avgjøldum.
*Stk. 3.* Trygdin er í minsta lagi kr. 500.000.

**§ 2.** Flutningsfyritøka ella speditørur má ikki útflýggja vøru, áðrenn hon er tollavgreidd. Eru vørurnar tollskyldigar, mugu tær ikki útflýggjast, fyrr enn tollur og avgjøld eru goldin.
*Stk. 2.* Flutningsfyritøka og speditørar kunnu útflýggja vøru, sum ikki er tollavgreidd og goldin, til flutningsfyritøkur og speditørar, sum hava loyvi frá TAKS eftir hesi kunngerð.
*Stk. 3.* Flutningsfyritøka ella speditørur kann útflýggja vøru, sum ikki er tollavgreidd og goldin, til vørumóttakarar, sum hava tollkreditt.
*Stk. 4.* Hóast ásetingina í § 2 stk. 1 og 3 kann flutningsfyritøka ella speditørur ikki útflýggja vøru, fyri enn 24 tímar eru gingnir frá tí góðsið er skrásett í skipan hjá TAKS, og er talan um høvuðsgóðs, frá tí góðsið er býtt sundur sambært § 5, stk. 2 ella § 6, stk. 2. TAKS kann í hesum tíðarskeiði geva flutningsfyritøku ella speditøri boð um, at vøra skal eftirhyggjast av TAKS, áðrenn hon kann útflýggjast. TAKS kann geva loyvi til, at vøra kann útflýggjast áðrenn 24 tímar eru gingnir.
*Stk. 5.* § 2, stk. 4 er ikki galdandi fyri vøru, sum kemur við posti.

*Stk. 6.* Flutningsfyritøka ella speditørur skal boða TAKS frá vørusendingum frá privatpersóni til privatpersón. Vøran skal eftirkannast av TAKS, áðrenn hon kann útflýggjast.

**§ 3.** Flutningsfyritøkan og speditørurin ábyrgist fyri tolli og avgjøldum á vøruni.

**§ 4.** Flutningsfyritøka ella speditørur skal goyma vøru, sum ikki er tollavgreidd og goldin, í goymslu, sum er góðkend av TAKS.
*Stk. 2.* Goymslan skal verða vard, so onnur enn viðkomandi starvsfólk hjá fyritøkuni ikki hava møguleika fyri at skaffa sær atgongd til hølið og vøruna.
*Stk. 5.* TAKS kann seta treytir til goymsluhølini.

**§ 5.** Flutningsfyritøka skal skráseta góðs, sum kemur við skipi, elektroniskt í skipan hjá TAKS í minsta lagi 24 tímar áðrenn skipið kemur í føroyskt tolløki, ella í seinasta lagi 1 tíma aftaná at skipið er farið úr útlendskari havn.
*Stk. 2.* Er tað eitt høvuðsgóðs, skal flutningsfyritøka ella speditørur beinanvegin, og í seinasta lagi tá góðsið er uppskipað á tolløkið, býta góðsið sundur, og í minsta lagi skráseta móttakara av vøruni, avsendara av vøruni, kolli, vekt og vøruheiti elektroniskt í skipan hjá TAKS. Er talan ikki um høvuðsgóðs, skal góðsið skrásetast á sama hátt sum ásett í 1. pkt. TAKS kann krevja aðrar skrásetingar av vøruni.

**§ 6.** Flutningsfyritøka skal skráseta góðs, sum kemur við flogfari, elektroniskt í skipan hjá TAKS í seinasta lagi, tá flogfarið fer úr útlendskari floghavn.
*Stk. 2.* Er tað eitt høvuðsgóðs, skal flutningsfyritøka ella speditørur beinanvegin býta góðsið sundur, og í minsta lagi skráseta móttakara av vøruni, avsendara av vøruni, kolli, vekt og vøruheiti elektroniskt í skipan hjá TAKS. Er talan ikki um høvuðsgóðs, skal góðsið skrásetast á sama hátt sum ásett í 1. pkt. TAKS kann krevja aðrar skrásetingar av vøruni.

**§ 7.** Flutningsfyritøka ella speditørur, sum tollavgreiðir, skal fyri hvørja vøru í skipan hjá TAKS í minsta lagi skráseta, navn og adressu hjá móttakara, navn og adressu hjá avsendara, upphædd, vørunummar og lýsing av hvat vøran inniheldur. TAKS kann krevja aðrar skrásetingar av vøruni.

**§ 8.** Flutningsfyritøka ella speditørur kann bert strika góðs eftir vegleiðing frá TAKS. Tann sum strikar góðs, skal elektroniskt í skipan hjá TAKS grundgeva fyri hví góðs er strikað. TAKS vegleiðir hvussu grundgevast skal. Allar aðrar broytingar ella strikingar av góðsi skulu til TAKS til avgreiðslu.

**§ 9**. Tollskjøl, sum flutningsfyritøka ella speditørur tollavgreiðir fyri vinnuligar innflytarar, skula útflýggjast til móttakaran av sendingini. Móttakarin av sendingini skal goyma skjølini sum roknskaparskjøl sambært løgtingslóg um bókhald.
*Stk. 2.* Tollskjøl, sum fyritøkan tollavgreiðir fyri innflytarar, sum ikki eru vinnuligir, skulu útflýggjast til móttakaran av sendingini.
*Stk. 3.* Flutningsfyritøka og speditørur skulu hava eitt eintak av tollskjølunum eftir í skjalagoymslu síni sum eftirlitsskjal. Skjølini skulu goymast sum roknskaparskjøl sambært løgtingslóg um bókhald.
*Stk. 4.* Rættingar ella broytingar í tollrokningum skulu latast til avgreiðslu hjá TAKS, saman við øllum tollskjølum.
*Stk. 5.* Sum tollskjøl eru í hesum sambandi at skilja øll skjøl, sum skulu liggja til grund fyri tollútrokningini av vøruni, so sum farmabræv, farmagjaldsrokning, útgreinað tollingaráheitan, fakturi, váttanir, loyvir, konossement og kreditnotur.

**§ 10.** Flutningsfyritøka ella speditørur skal skjótast til ber lata fyritøku, sum hevur tollkreditt, skrivliga uppgerð yvir vørur, ið eru útflyggjaðar. Fyritøkan, sum hevur

tollkreditt, skal goyma uppgerðina sum roknskaparskjal sambært løgtingslóg um bókhald.

**§ 11.** Flutningsfyritøka ella speditørur, sum tollavgreiðir, hevur skyldu til at tryggja sær, at starvsfólk, sum tollavgreiðir, hevur vitan til tollreglurnar, toll- og vøruskránna og upprunareglurnar.

**§ 12.** TAKS kann til eina og hvørja tíð kanna grundarlagið fyri yvirflytingum og broytingum av góðsupplýsingum.
*Stk. 2.* TAKS kann til eina og hvørja tíð kanna vørur og fraktsendingar. Fyritøkan skal verða TAKS til handa og skal geva allar upplýsingar, sum TAKS metir verða neyðugar fyri at fremja eftirlitið.

**§ 13.** Brýtur flutningsfyritøka ella speditørur § 1, stk. 2, § 2, § 4, stk. 1, § 5, § 6, § 7, § 8, § 9, stk. 1, § 9, stk. 2, § 9, stk. 3, § 9, stk. 4, § 10, § 11, ella § 12, stk. 2 í hesi kunngerð, ella tær í loyvinum ásettu treytir, kann TAKS taka loyvið eftir kunngerðini aftur.

**§ 14.** Flutningsfyritøka ella speditørur sum:
1) Útflýggjar vøru í stríð við § 2 verður revsað við sekt á 5.000 kr.
2) Ikki goymir vøru á góðkendari goymslu, sambært § 4, stk. 1, verður revsað við sekt á 3.000 kr. fyri hvørja vøru.
3) Ikki skrásetir góðs ella gevur skeivar upplýsingar um góðs, sambært § 5, stk. 2, verður revsað við sekt á 3.000 kr. fyri hvørt góðs, sum ikki er skrásett ella fyri hvørt høvuðsgóðs, sum ikki er býtt sundur.
4) Ikki skrásetir góðs ella gevur skeivar upplýsingar um góðs, sambært § 6, stk. 2, verður revsað við sekt á 3.000 kr. fyri hvørt góðs, sum ikki er skrásett ella fyri hvørt høvuðsgóðs, sum ikki er býtt sundur.
5) Ikki skrásetir ella gevur skeivar upplýsingar, sambært § 7, verður revsað við sekt á kr. 3.000 kr. fyri hvørja sending, hvar vøra ikki er skrásett, ella hvar skeivar upplýsingar eru givnar.
6) Strikar góðs í stríð við vegleiðing frá TAKS, sambært § 8, verður revsað við sekt á 3.000 kr. fyri hvørja striking sum er framd.
7) Ikki goymir tollskjøl, sambært § 9, stk. 3, verður revsað við sekt á 3.000 kr.

*Stk. 2.* Flutningsfyritøka sum
1) ikki skrásetir góðs innan ásetta tíð, sambært § 5, stk. 1, verður revsað við sekt á 3.000 kr. fyri hvørt góðs sum ikki er skrásett.
2) Ikki skrásetir góðs innan ásettu tíð, sambært § 6, stk. 1, verður revsað við sekt á 3.000 kr. fyri hvørt góðs sum ikki er skrásett.

*Stk. 3.* Er gerðin framd við tilætlan til at sleppa undan at rinda toll ella avgjøld, verður fyritøkan revsað við sekt ella fongsul upp til 2 ár sambært § 34, stk. 2 í løgtingslógini.

**§ 16.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd. Samstundis fer úr gildi kunngerð nr. 30 frá 1. mai 2006 um undantaksloyvi frá flutningsfeløgum og speditørum at flyta vørur beinleiðis til móttakaran.
*Stk. 2.* Trygdir, sum eru givnar eftir § 1, stk. 2 í kunngerð nr. 30 frá 1. mai 2006 um undantaksloyvi frá flutningsfeløgum og speditørum, eru framvegis í gildi.
*Stk. 3.* Loyvir, sum eru givin til flutningsfeløg og speditørar eftir kunngerð nr. 30 frá 1. mai 2006 um undantaksloyvi frá flutningsfeløgum og speditørum at flyta vørur beinleiðis til móttakaran, fara úr gildi, samstundis sum henda kunngerð kemur í gildi. Flutningsfeløg og speditørar varðveita loyvi við teimum treytum, sum eru ásett í hesi kunngerð, og skulu ikki søkja av nýggjum.

Fíggjarmálaráðið, 22.01.2025

**Ruth Vang**
landsstýriskvinna

/ Bjarni A. Bjarnason